## Neyðugt við rakettum

Tunna atmosferan á mánanum bar eisini tekniskar trupulleikar við sær. Uttan mótstøðuna, sum væl tættari atmosferan á jørðini hevur, er nevnliga sera trupult at fáa nakra uppdrift á eitt rúmdarskip. Rakettmotorar vóru loysnin til hetta, tí hesir virka eisini í tunnu atmosferuni, sum er á mánanum.



## Russar lendu fyrst

Áðrenn menn vórðu sendir á sjálvan mánan, máttu fleiri royndarlendingar gerast við maskinum. Endamáli ðvar at vita, um tað bar til at gera eina bleyta lending. Altso eina lending, sum varð framd somikið spakuliga, at tólbúnaður og menn kundu koma heilskapað frá hesum. Slíka lending vóru russar teir fyrstu at gera, og gjørdu teir tað longu í 1966.

21. juli 1969:

# 40 ár síðani Armstrong setti fótin á mánan

**Klokkan 2:56 tann 21. juli í 1969 hendi tann kanska mest minniliga stundin hjá mannaættini í 20. øld. Tá settu Neil Armstrong og Edwin "Buzz" Aldrin fótin á mánan. Eisini heima í Føroyum sótu nógv fólk og fylgdu við søguligu stórhendingini**

MÁNALENDING

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Undir kalda krígnum kappaðust USA og Sovjetsamveldið á mongum økjum. Stórveldini kappaðust innan vísind, ítrótt og ikki minst um at standa seg best í rúmdini.

Í byrjanini legði Sovjetsamveldið seg á odda í rúmdarstríðnum. Í 1957 tók Sovjetsamveldið vesturheimin av fótum, tá teir sendu lítla fylgissveinin "Sputnik" í ringrás kring jørðina.

Bert fýra ár seinni gjørdist russarin, Jurij Gagarin fyrsta menniskja, sum ferðaðist úti í rúmdini. Gagarin náddi kring jørðina uppá bara 108 minuttir. Tá stóð øllum greitt, at Sovjetsamveldið var í gongd við at hølva USA av í kappingini um rúmdina.

Amerikanskir herleiðarar staðfestu yvirfyri amerikonsku stjórnini, at tapti USA kappingina um rúmdina, so kundi tað eisini koppa javnvágina í stríðnum ímóti heimskommunismuni. Okkurt mátti gerast stundisliga fyri at venda gongdini.

### Ikki hugaður í byrjanini

John F. Kennedy, amerikanskur forseti, árini 1961-1963 var ikki so hugaður í at satsa ov nógv í kappingini um rúmdina. Men tað eydnaðist hernaðarligu ráðgevarunum at fáa unga amerikanska forsetan á aðrar tankar.

Stutt aftaná sovjetisku sigursferðina hjá Jurij Gagarin, helt John F. Kennedy eina minniliga røðu fyri amerikanska samveldistinginum, har hann boðaði amerikonsku tjóðini frá, at USA ætlaði at senda eitt menniskja til mánan, og at føra viðkomandi trygt aftur til jørðina.

Talan var um eina risaverkætlan, sum skuldi førast út í lívið, áðrenn 1960-árini vóru liðin. Risastóra rúmdarverkætlanin var nevnd "Apollo". Nýggjar rúmdarrakettir, rúmdarskip og rúmdarbúnar vóru framleidd í hópatali, og túsindtals menniskju vóru sett í ymisk størv, sum høvdu samband við verkætlanina.

Menn hava roknað uppá tølini, og mett verður, at Apollo-verkætlanin kostaði 130 miliardir dollarar í nútíðarpeningi.

### Ymiskir av lyndi

Teir tríggir austronautarnir, sum vóru útvaldir at fara við á mánaferðini hjá Apollo 11 rúmdarskipinum, vóru allir føddir í 1930, og vóru sostatt í bestu árum, tá teir framdu ta minniligu ferðina.

Teir útvaldu austronautarnir vóru Neil Armstrong, Edwin "Buzz" Aldrin og Michael Collins.

Armstrong, Aldrin og Collins høvdu ógvuliga ymisk lyndi. Collins var tann mest stilli av teimum trimum austronautunum. Collins fekk til uppgávu at stýra móðirskipinum, Colombia, og tí fekk hann ikki lut í søguligu møguleikanum at lenda á mánanum.

Edwin "Buzz" Aldrin var av skandinaviskari ætt, omman og abbin fluttu úr Værmlandi í Svøríki og til USA, seinast í 19. øld. Leingi helt Buzz Aldrin, at hann fór at gerast tað fyrsta menniskja, sum slapp at stíga fótin á mánan, men valið fall á Neil Armstrong. Buzz Aldrin var heldur opinskáraður, meðan Neil Armstrong var meiri róligur, og dugdi betur at leggja sær orðini.

Henda støðan hevur so insperað norska rithøvundin, Johan Harstad til at skriva skaldsøguna "Hvor ble det av deg i alt mylderet, Buzz Aldrin?". Ein skaldsøga um ein mann (Matthias), sum standur í skugganum, eins og Buzz Aldrin kom at standa í skugganum av Neil Armstrong.

### 380.000 kilometrar

Mánaferðin hjá Apollo 11 byrjaði á Kennedy Space Center í deilríkinum, Florida tann 16. Juli. Aftaná eina ferð uppá 380.000 kilometrar, sum tekur fýra dagar, er tað stóra málið í eygsjón.

Buzz Aldrin og Michael Collins gera klárt at fara umborð á "The Eagle", sum er eitt sjey metrar høgt mánalendingarskip. Sniðið á The Eagle er rættiliga primitivt, og mánalendingarskipið er ikki lætt at stýra. Michael Collins verður eftir umborð á móðirskipinum.

Aldrin og Armstrong nærkast mánanum, og gera klárt til at lenda, men tað er nær við at ganga galið beinavegin. Økið, sum er valt til teirra mánalending vísur seg at vera fult av stórum steinum, men í seinastu løtu megnar Armstrong at stýra The Eagle burtur frá vandaøkinum.

Men nú eru teir fleiri kilometrar frá málinum hjá sær, og brennievni er við at ganga undan. So koma boðini frá kontrolrúminum í Houston: "60 sekundir", tað er tíðin Armstrong hevur til at fáa The Eagle uppá pláss. Armstrong sær næstan einki. Rakettmotorarnir hava elvt til eitt mikið dustrok, so tað kennist sum um teir flúgva gjøgnum eitt skýggj.

"30 sekundir" ljóðar frá kontrolrúminum í Houston. Í kontrolrúminum í Houston er panikkur. Men Armstrong er sum altíð, róligur og fattur. Og knappliga er mánin fyri teimum. Armstrong megnar at gera eina bleyta lending.

Klokkan er 20.17 í Føroyum, og dagurin er 20. juli. Tvey menniskju eru lend á mánanum. Staðið Armstrong og Aldrin eru lendir á verður nevnt "Mare Tranquillitatis" – stillunnar hav.

### Jógvan Arge rapporteraði heim

Kring heimin fylgja 100-tals av miljónum við tí, sum hendir í bæði sjónvarpi og í útvarpi.

Heima í Føroyum sita fólk eisini sum negld í gólvið. Útvarpsstjórin, Niels Juel Arge, hevur sett seg inn í studio á Bryggjubakka, og hann og tøkningurin, Marius Rein, hava samband við Jógvan Arge, sum er staddur í Danmark. Jógvan hevur eitt svart/hvítt sjónvarp frammanfyri sær, hetta er 10 ár áðrenn sjónvarpið kemur til Føroya.

Danska sjónvarpsmonopolið, DR sendir beinleiðis frá søguligu stórhendingini. Jógvan rapporterar hegnisliga frá øllum tí, sum hendir. Inni í studionum hjá Niels Juel sita tveir smádreingir, púra kúrrir og lurta við spenningi.

Niels Juel hevur lagt teimum eina við, at teir sleppa at sita inni í studionum, um teir ikki geva eitt einasta ljóð frá sær.

Teir eru systkinabørn, og eita Torbjørn Jacobsen og Magni Arge.

*Framhald á síðu 20*

## Kinverjar vistu einki


SOSIALURIN

Vit komu í friði fyri alla mannaættina

Mánalendingin stóð sum vera man á breddanum hjá fjølmiðlum kring allan heim.

Eisini í Sosialinum varð nógv gjørt burturúr, og í tann 23. juli í 1969 var mánalendingin ovasta søgan á forsíðuni.

Millum annað verður skrivað í blaðnum, sum altso var á gøtuni tveir dagar eftir sjálva lendingina, at kinverjar framvegis ikki vistu, hvat var hent. Hetta tí kinverska stjórnin hevði sett forboð ímóti at varpa amerikonsku propaganduna út. Russiska sjónvarpið sendi hinvegin myndir frá hendingini.